


www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 08 - 2013

# Marknaðarføra Føroyar á oljumessu í Skotlandi

Føroyskt vinnulív er væl umboðað, tá altjóða oljumessan Offshore Europe 2013 (OE13) verður í skotska oljuhøvuðsstaðnum Aberdeen í næstum. Átta føroyskar fyritøkur og tríggjar havnir eru partur av føroyska básinum á risastóru framsýningini, sum verður í døgunum 3. til 6. september. Luttakarar Luttakararnir á OE13 eru: Atlantic Supply Base, Pam Offshore (MEST), Runavíkar Havn, Føroya Tele (Shefa), Atlantic Airways, Vónin, Faroe Ship, Vága Floghavn, Tórshavnar Havn, Vágs Havn og Atlantic Petroleum. Haraftrat eru eisini umboð fyri oljumyndugleikarnar, Jarðfeingi og fyri tey bæði áhugafeløgini, Oljuvinnufelagið og Føroya Oljuídnaðarbólk (FOÍB). Tað eru Promte Faroe Islands (Uttanríkisdeildin á Løgmansskrivstovuni) og sum skipar fyri tiltakinum í samstarvi við Oljuvinnufelagið (partur av Vinnuhúsinum), Føroyskar fyritøkur, sum arbeiða í ella hava eitthvørt tilknýti til olju- og frálandavinnuna, hava nærum á hvørjum ári seinastu umleið 20 árini luttikið á framsýningum á teimum báðum stóru altjóða oljumessunum ONS í Stavanger og Offshore Europe í Aberdeen, sum skiftast annaðhvørt ár. Hetta fyri at fáa nýggjar sáttmálar, menna og skapa sambond við útlendskar fyritøkur í olju- og frálandavinnunum. Tað luttaka vanliga túsundtals fyritøkur úr fleiri enn 100 londum á framsýningunum, sum verða vitjaðar av umleið 50.000 fólkum. Eisini verður varpað ljós á mest aktuellu spurningarnar í vinnuni á stórari oljuráðstevnu, har millum mest framstandandi olju- og orkufólk og politikarar luttaka. Veitarar Offshore Europe er fyrst og fremst ein framsýning fyri veitarar til olju- og frálandavinnuna. Men eisini fleiri av teimum stóru altjóða oljufeløgunum luttaka. Á føroyska básinum verður høvi hjá veitarum til hesa stóru vinnu at hittast og kunna um vørur og tænastur, umframt at høvi eisini verður hjá teimum túsundatals vitjandi at fáa innlit í, hvat føroyska veitaravinnan til oljuvinnuna hevur at bjóða. Eisini verður roynt

á básinum at kunna um Føroyar. Føroyska náttúran og serstaka mentanin eru tí eisini ein týðandi partur av brandingini av Føroyum í altjóða oljuverðini. Spennandi gongd Síðani føroyingar av álvara fingu áhuga fyri olju- og frálandavinnuni er tað bara gingið ein veg  og tað er frameftir. Alsamt fleiri og fleiri føroyskar fyritøkur hava sæð nýggjar møguleikar og avbjóðingar í hesum nýggju vinnum. Og tað hevur so sanniliga givið afturljóð í føroyska samfelagnum, sum hevur verið vitni til hundraðtals nýggj arbeiðspláss og millióna inntøkur. Her er veruliga talan um eina sólskinssøgu. Saman við oljuleitingini á føroyska landgrunninum hevur føroyska veitingarvinnan av álvara sett seg á oljuheimskortið. Her man skjótt vaksandi frálandaflotin eiga ein stóran og týðandi lut, tó at fleiri smærri og størri fyritøkur eisini hava ein virknan leiklut sum veitarar til útlendsku oljuvinnuna. Men tað er neyvan nøkur orsøk til at steðga her. Potentialið tvs. menningarmøguleikarnar at lata vørur og tænastur til altjóða oljuvinnuna eru ovurhonds stórir, og føroyskar fyritøkur kunnu menna seg uppaftur meira henda vegin. Við at luttaka á oljumessum sum hesari í Aberdeen eru ríkir møguleikar fyri at lata seg kveikja til at fáa eyguni upp fyri nýggjum møguleikum. Aftrat veitingarvinnuni eiga vit ikki at gloyma týdningin, sum tey bæði føroysku oljufeløgini hava og ikki minst kunnu fáa í framtíðini. Minst og størst Samanumtikið ber til at siga, at Føroyar sum helst ein tann minsta tjóðin, ið luttekur á oljumessuni í Aberdeen, uppá seg kanska er millum størstu veitarar til hesa vinnuna. Føroyski básurin í Aberdeen, sum lýsingarfyritøkan Sansir hevur sniðgivið, varpar eisini ljós á Føroyar sum leitiøki. Her fara umboð fyri Jarðfeingi og FOÍB at gera sítt til at kunna um møguleikarnar hjá altjóða oljufeløgum at gera íløgur í leiting eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini. At Statoil og onnur oljufeløg fara at bora tveir brunnar á føroyska landgrunninum næsta ár, fer uttan iva eisini at skapa áhuga og virka sum ein magnetur á føroyska básinum í Aberdeen.